# Minni yvirskot í Norðoya Sparikassa

**Virksemið veksur, men yvirskotið tódnar eitt lítið sindur**

ROKNSKAPUR
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

- Vit eru væl nøgdir. Serliga tá vit hugsa um, at gongdin í samfelagnum er sum hon er.

Orðini eigur Marner Mortensen, varastjóri fyri Norðoya Sparikassa. Hóast úrslitið fyri fyrstu seks mánaðirnar av 2005 vísir 698.000 krónur minni í yvirskoti í mun til sama tíðarskeið í fjør, tá úrslitið var 8,9 milliónir krónur í yvirskoti. Soleiðis at Norðoya Sparikassi nú er 8,2 milliónir ríkari.

Stagneraði búskapurin hevur ikki minkað munandi um hugin hjá fólki at lána pengar, og innlánið hjá sparikassanum er eisini voksið.

À at kalla øllum økjum er gongdin hjá Norðoya Sparikassi betri enn í 2004, men á útreiðslusíðuni gongur skeiva vegin.



Útreiðslur til starvsfólk og umsiting vóru 16,5 milliónir krónur móti 14,7 milliónir krónur fyrra hálvár í fjør. Hetta er ein vøkstur uppá 1,8 mió. kr.

- Vøksturin stavar í høvuðsheitinum frá øktum umsitingarútreiðslum til Elektron og aðrar veitarar og sáttmálabundnum lønum, sigur Marner Mortensen.

Hann roknar ikki við eins stórum útreiðslum næsta hálvar. Nýggi lønarsáttmálin gevur eitt prosent í lønarhækkan í ár og eitt prosent næsta ár.

- Varisliga meta vit, at úrslitið fyri seinna hálvár verður minst líka gott, um ikki betri, sigur Marner Mortensen.

Tveir triðingar av handilsgrundarlagnum hjá Norðoya Sparikassa er at finna í Klaksvík. Ætlanin er at lata deildir upp í Havn og í Runavík, tá Norðoyatunnilin letur upp. Norðoya Sparikassi ætlar at halda verandi virkisbýti við tveimum triðingum privatfígging og einum triðingi vinnufígging.

**Tølini**

Fólk skulu ikki rokna við, at Norðoya Sparikassi fer av knóranum í næstum. Eins og hinir føroysku peningastovnarnir stendur rættiliga væl, og norðasti sparikassin í landinum er væl bjálvaður til vetrartíð.

Netto rentuinntøkurnar hjá sparikassanum fyrra hálvár vóru 28 mió. kr. og er hetta ein vøkstur uppá 1,1 mió. kr. í mun til fyrra hálvár 2004, tá netto rentuinntøkurnar vóru 26,9 mió. kr.

Netto rentu- og kostnaðarinntøkurnar hjá sparikassanum fyrra hálvár vóru 29,6 mió. kr. móti 28,6 mió. kr. sama tíðarskeið í 2004. Hetta er ein vøkstur uppá 1 mió. kr.

Fíggjarstøða sparikassans javnvigar nú við 1.252 mió. kr. móti 1.178 mió. kr. fyrra hálvár 2004. Hetta er ein vøkstur uppá 6,2%. Innlánið er nú 970 mió. kr. móti 914 mió. kr. fyrra hálvár 2004, sum svarar til ein vøkstur uppá 6,1%. Útlánið er nú 1.048 mió. kr. móti 899 mió. kr. fyrra hálvár 2004, svarandi til ein vøkstur uppá 16,6%.

Eginpeningur sparikassans er nú góðar 268 mió. kr., og er farna árið øktur við 16,5 mió. kr., ið er ein vøkstur uppá 6,6%. Egin-ognin er nú 21,4% av samlaðu fíggjarstøðuni móti 21,3% í fyrra hálvár 2004.

Solvensur sparikassans er 27,1%, í mun til 28,3% fyrra hálvár 2004. Lógin krevur 8%.

# Oljumálningar í Smiðjuni

Framsýning við oljumálningum og vatnlitum, sum Sofus Poulsen hevur málað letur upp í Smiðjuni í Lítluvík leygardagin.

Sofus hevur regluliga framsýningar, men hetta er fyrsta framsýningin hjá Sofusi í ár. Útvið fimtan nýggj verk verða at síggja á framsýningini.

Summir av málninginum vísa aftur til neoprimitivismuna. Ítøkilig naturalisma. Líkt tí hjá Mykines í fimtiárunum. Aðrir málningar eru meira impressionistiskar tulkingar av landsløgum.

Framsýningin letur upp leygardagin kl. 11 og opið er til kl. 18. Framsýningin hevur opið til mikudagin frá kl. 11 til 18.

**-HR**



*Sofus Poulsen sýnir fram í Smiðjuni í Lítluvík*

# Prísansing og avtøku av oljuavgjaldinum

**Fakfeløg á privata arbeiðsmarknaðinum krevja oljuavgjaldið avtikið og prísansing**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Havnar Arbeiðsmannafelag, Havnar Arbeiðskvinnufelag, Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag, Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag og Føroya Arbeiðarafelag heita nú føroyskar politikarar um at seta á stovn á prísansing og at avtaka oljuavgjaldið.

- Vit frætta dag og dagliga, at hóast vanligi løntakarin ikki fær nakra lønarhækking, so hækka prísirnir á handilsvørum alsamt uttan at nakað eftirlit er við hesum prísvøkstri.

Vit meta tað vera ábyrgdina hjá politiska myndugleikanum at bera so í bandi, at prísansing verður sett í verk, soleiðis at møguleiki ikki er fyri ótálmaðari hækking av prísinum á vanligum handilsvørum, skriva feløgini.

Og tað er ikki ikki nóg mikið við tí. Nógv umrødda oljuavgjaldið skal eisini burtur.

- Talan er um ein eyka skatt, sum er steinur oman á byrðu hjá nógvum familjum, og við øktum útreiðslum og alsamt minkandi arbeiði í høvuðsvinnu okkara, meta vit tað vera skyldan hjá okkara fólkavaldu polittikarum, at taka upp hetta mál.

Vit heita á allar politisku flokkar á tingi umframt hvønn einstakan fólkavaldan politikara um at melda greitt út, hvørja støðu tey hava til frammanfyri nevndu áheitan okkara, soleiðis at borgarin veit, hvørja støðu politikararnir hava til hetta álvarsmál, skriva feløgini.

Enn frættist ikki nakað um afturmelding frá politisku flokkunum.

# Dýra skrásetingin varðveitt

**Skrásetingargjaldið fyri at flyta føroyskan bil til Danmarkar verður ikki broytt. Men danski ráðharrin gloppar hurðina fyri at fáa gjaldið afturgoldið**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Fólkatingslimurin Høgni Hoydal hevur fingið svar frá Kristian Jenstre, ráðharra í skattamálum úr Venstre.

Høgni Hoydal spurdi Kristian Jensen í fyrispurningi um viðurskiftini við fullum skrásetingargjaldi á føroyskar bilar, sum verða innfluttir til Danmarkar. Til 1. juni 1999 kundu føroyingar flyta egnan bil til Danmarkar uttan at gjalda skrásetingargjald.

Í tíðindaskrivi skrivar Norðuratlantsbólkurin, at reglugerðin var helst broytt orsakað av spekulatión. Í brævið til Skattamálaráðharran tann 30. mai 2005 spurdi Høgni Hoydal, um spekulatiónin møguliga kann steðgast á annan hátt, eitt nú við forboðið av sølu tey fyrstu trý árini í Danmark.

Kristian Jensen avvísir at broyta reglugerðina, men skjýtur upp at seta á stovn eina skipan, har skrásetingin verður afturgoldin, tá føroyingar flyta aftur av landinum.

- Tá Føroyar ikki eru partar av ES, skulu Føroyar heldur ikki hava sertreytir, sum onnur lond uttan fyri ES ikki hava, skrivar Kristian Jensen í svari til fyrispurningin.